


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Áhugi fyri føroyskum leikarum

*Hóast laku úrtøkuna hvat úrslitum viðvíkur, hevur føroyska luttøkan í U-16 kappingini vakt ans*



*Liðskiparin á føroyska U-16 liðnum, Jann Ingi Petersen, sleppur nú til PSV Einhoven á venjingarferð*

Jákup Mørk

Annað kann ikki sigast, nú tað tykist greitt, at í øllum førum tríggir leikarar frá føroyska U-16 liðnum hava fingið innbjóðingar til venjingar uttanlands.

Í farnu viku frǽttist frá HB, at Rani D. Christiansen var boðin til Middlesbrough í Onglandi.

Nú er so greitt, at eisini teir báðir, Jann Ingi Petersen úr B68 og Ingi Højsted úr B36 hava fingið tilboð um at venja við útlendskum feløgum.

**Áhugi fyri fleiri**

Hesu ferð er tað hollendska stórfelagið, PSV Einhoven, sum hevur sýnt áhuga. Felagið, sum millum annað hevur vunnið Europa-Cup fyri meistarar, hevði umboð í Føroyum, tá U-16 kappingin varð leikt, og síðani hava teir so boðið teimum báðum føroyingunum at koma til venjingar.

Júst nær venjingarnar verða, er ikki endaliga fastlagt, men allarhelst verður tað einaferð í oktober mánaði. U-16 landsliðið skal tá til Hollands at royna seg í EM-undankapping, og harumframt er heystfrítíðin hjá skúlunum eisini um hetta mundi.

Tað er Jákup í Stórustovu, sum hevur umsitið samskiftið millum PSV og føroysku partarnar, og hann heldur, at økti áhugin fyri føroysku leikarunum avgjørt eigur at takast sum eitt herðaklapp til føroyskan føroyskan fótbólt. Bæði á landsliðs- og felagsstøði.

Jákup sigur víðari, at talan møguliga eisini verður um at aðrir leikarar frá U-16 liðnum sleppa út um landoddarnar at royna seg, men at einki tó er endaliga avgjørt í so máta.



*Saman við Jann Inga fer eisini liðfelagin á U-16 liðnum, Ingi Højsted úr B36*

J&K

Almenn móttøka

Í sambandi við at

– Felagið er 25 ár
– Vit eru flutt í nýggjan skrivstovu- og verkstaðsbygning
– Fyrst setti arbeiðsmaður Jógvan Lamhauge hevur 25 ára starvsdag

verður boðið til móttøku í hølum okkara á Hjalla

fríggjadagin 25. august kl. 14.00 til 17.00

J&K Petersen

Sosialurin - 311820

# 1,3 mió kr. frá UEFA

*Europeiska fótbóltssamgongan avroknar nú inntøkurnar frá Europa cup kappingunum í 1999/2000*

Jákup Mørk

Umframt tær inntøkur, sum luttakandi føroysku liðini hava fingið frá UEFA, verður peningur eisini latin FSF fyri føroysku luttøkuna.

**Til hini**

Til samans er talan um 272 túsund sveitsiskar frankar, svarandi til uml. 1,3 mió kr.

Reglurnar hjá UEFA viðvíkjandi útgjaldingini eru í ár broyttar, soleiðis at hesin peningur skal latast teimum feløgum, sum ikki hava tikið lut í europeisku kappingunum.

Har umframt treytar UEFA sær eisini, at peningurin verður nýttur til ungdómsarbeiði í teimum feløgum, sum móttaka upphæddina.

**Ikki greiðar reglur**

Hvussu hesar reglur ávirka upphæddina til Føroyar, er tó ikki endaliga greitt.

Reglurnar hjá UEFA eru ætlaðar teimum londum, har proffesionel feløg hava serstaka fótbóltssamgongu.

Ísak Mikladal, aðalskirvari í FSF sigur, at FSF í næstum fer at hava fund um málið, og at støða tá verður tikin um hetta.

Hvat úrslitið av hesum verður, er sjálvandi ilt at gita um, men í øllum førum er líkt til, at upphæddirnar onkursvegna fara at koma øllum feløgunum í fremstu mansdeildini til góðar.

# FCK tapti aftur

*Hóast leikliga yvirvág eydnaðist tað heldur ikki hesu ferð hjá Toda og teimum at fáa trý stig við sær aftur úr Jyllandið.*

Jákup Mørk

Mánadagin leikti FCK á útivølli móti nýggja superliguliðnum, FC Midtjylland.

Serliga í fyrra hálvleiki hevði FCK stóra leikliga yvirvág, men hóast teir báðir áleypararnir, Pascal Simpson og Harald Brattbak, høvddu fleiri møguleikar, so eydnaðist tað ongantíð at at leggja seg á odda.

Í seinna hálvleiki kom heimaliðið nógv betur við í dystin, og tað eydnaðist teimum eisini at leggja seg á odda, tá 55 minuttir vóru leiktir.

Eisini eftir hetta hevði FCK onkrar góðar møguleikar, og millum annað rakti Simpson tvørstongina ta einu ferðina, meðan heimaliðið í hinum endanum eisini skeyt á stongina.

Todi Jónsson var við frá byrjan, men varð skiftur út í 71. minutti.

Samanumtikið eitt úrslit, sum høvuðsstaðarfelagið við stórslignu ætlanunum ikki kann vera nøgt við. FCK er nú á 10. plássið í superliguni við 4 stigum fyri 5 dystir.

Komandi umfar verður stórdystur, tá FCK á heimavølli tekur móti Brøndby. Ein dystur, sum skal vinnast, um FCK ætlar sær at gera ætlanir sínar um kappingarárið til veruleika.



# KÍ ikki til at steðga

*KÍ vann størsta sigurin í ár um vikuskiftið, meðan HB og B36 eisini fingu trý týdningarmikil stig í kappingini um at fáa KÍ aftur á stigartalvuni*



*Malena Jospehsen skeyt ikki færri enn 8 mál, tá KÍ sunnudagin vann higartil størsta sigurin í endaspælinum*

***Mynd: SJH***

Heini í Skorini

Størsti sigurin higartil í kvinnudeildini í ár var í Klaksvík, har KÍ kvinnurnar snøgt sagt hølvaðu Skála av. KÍ var sjálvsagt stórfavorittur undan dystinum, men at tað skuldi gerast ein so stórur sigur í Klaksvík sunnudagin, høvdu fá roknað við.

KÍ legði út sum eitt óløgið, og longu langt áðrenn liðini fóru til hálvleiks, var dysturin avgjørdur. Hálvleiksstøðan var heili 13-0 til KÍ, og tá dómarin bríkslaði dystin av, var støðan 17-0, sum eisini er størsti sigurin í ár í kvinnudeildini. Malena Josephsen, sum hevur verið millum bestu leikararnar hjá KÍ og í allari kappingini í ár, skeyt ikki færri enn átta mál, og sostatt er hon á ovastu rók á máltindinum í endaspælinum hjá kvinnunum við 11 málum. Viviann Bjartalíð var eisini í málhýri sunnudagin, og hon skeyt fýra av teimum 17 málunum hjá KÍ. Síðani skutu Ragna Andreassen og Margit Joensen tvey mál í part, meðan Elsa Maria Simonsen skeyt eitt mál.

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Malena Josephsen | KÍ | 11 |
| Guðrun í Lágabø | VB | 7 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 6 |
| Annika Godtfred | HB | 5 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 5 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 4 |
| Sólvá Joensen | B36 | 3 |
| Margit Joensen | KÍ | 3 |
| Ragna Andreasen | KÍ | 3 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 3 |
| Laila Jespersen | VB | 3 |

adidas

**Týdningarmikil HB sigur**

HB var á Vági um vikuskiftið, hóast dysturin sambært kappingarskipanini skuldi verði leiktur í Havn. Tað bar so á fyri summarsteðgin, at HB ikki møtti upp til dyst í Vági í innleiðandi umfarinum, og vórðu tær dømdar at missa heimavøllin. HB hevur mótmælt, og nógv rok var undan dystinum um, hvar hann skuldi spælast. Men fyribils hava HB kvinnurnar mist heimavøllin, og tí var dysturin leiktur í Vági.

Men HB kvinnurnar fóru ikki niður við høvdinum av tí orsøk, og tær svaraðu aftur við at vinna ein greiðan sigur suðuri í Vági. Seinastu ferð kvinnufótbólturin var umtalaður, varð skrivað, at Eyðvør úr Dímun spældi sín síðsta dyst fyri HB seinasta sunnudag móti B36, av tí at hon skal aftur til Danmarkar í lestrarørindum, men hon spældi eisini við í Vági um vikuskiftið. Hon fer niður hósdagin, og sostatt var hetta hennara síðsti dystur í ár fyri HB.

Tað var eisini Eyðvør úr Dímun, sum legði HB á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og sostatt hevur hon skorað í hvørjum dysti, hon hevur spælt við fyri HB. Síðani økti tann altíð vandamikla Eyðfríð Christiansen um leiðsluna seint í fyrra hálvleiki, og 2-0 var eisini hálvleiksstøðan. Men heilt tíðliga í seinna hálvleiki minkaði Guðrun í Lágabø um munin fyri VB, og spenningurin var aftur stórur. Men HB kvinnurnar vildu nakað annað, og Eyðfríð Christiansen stóð enn einaferð fyri einum sera vøkrum máli miðskeiðis í seinna hálvleiki. Hon fer framvið 5-6 leikarum, og smekkar hon síðani bóltin í netið til 3-1 til HB. Í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, staðfesti Annika Godtfred sigurin við at økja um munin til 4-1, og var hetta eisini ein sonn perla. Eftir at vera farin framvið trimum leikarum, smekkar hon bóltin upp í málhornið, og sostatt vann HB ein sera týdningarmiklan sigur í Vági, sum í síðsta enda kann hava sera stóran týdning fyri kappingina.

**B36 vann tepurt í Runavík**

Eftir at B36 tapti móti HB seinasta vikuskiftið, var tað av alstórum týdningi, at tær fingu fulla úrtøku burtur úr dystinum í Runavík, har tær fyri summarsteðgin taptu heili 5-0.

Tá dómarin bríkslaði dystin av, var støðan 4-3 til kvinnurnar úr B36, sum sostatt enn hava ein møguleika at gera seg galdandi í stríðnum um heiðursmerkini.

NSÍ førdi annars bæði 2-0 og 3-2, áðrenn havnarkvinnur tryggjaðu sær sigurin. NSÍ førdi eisini 1-0 í dystinum ímóti HB, men tapti 2-1, so NSÍ er kanska ikki so langt frá sínum fyrsta sigri í endaspælinum.

Maibritt Olsen legði heimaliðið framum, og Irdi Hansen økti um leiðsluna til 2-0, áðrenn B36 slapp framat. Maria Vang skoraði eftir hornaspark, og Sólva Joensen javnaði stutt eftir.

Irdi Hansen legði NSÍ framum aftur, men Laila Enghamar javnaði. 3-3 var støðan, tá liðini fóru til hálvleik.

Seinni hálvleikur var ikki eins undirhaldandi og fyrri, og áskoðararnir sóu bara eitt mál eftir steðgin. Tað var Elsebeth Jónsson, sum skoraði eftir hornaspark, tá hálvur tími var eftir at spæla. Hetta vísti seg eisini at vera vinnandi málið, sum tryggjaði B36 trý stig, og tær hava enn møguleikan at fáa heiðursmerki í ár, men fá halda, at tær kunnu vinna føroyameistaraheitið.

**KÍ favorittur**

KÍ er einasta liðið við fullum stigatali, meðan øll hini liðini hava tapt minst ein dyst. KÍ er favorittur at vinna føroyameistaraskapið í kvinnudeildini, meðan størsta hóttanin óivað er HB, men tær missa Eyðvør úr Dímun, og tað verður torført at vinna uttan hana á liðnum.

Í næsta umfari møtast júst hesi bæði liðini, og um HB skal gera sær nakrar vónir um gerast FM vinnarar, mugu tær vinna dystin móti KÍ í Havn.

**Úrslit um vikuskiftið:**
**KÍ-Skála 17-0**
KÍ: Malena Josephsen 8, Viviann Bjartalíð 4, Ragna Andreassen 2, Margit Joensen 2, Elsa Maria Simonsen 1

**HB-VB 4-1**
(Leiktur í Vági).
HB: Eyðvør úr Dímun 1, Eyðfríð Christiansen 2, Annika Godtfred 1
VB: Guðrun í Lágabø 1

**NSÍ-B36 3-4**
NSÍ: Elsebeth Olsen, Irdi Hansen 2
B36: Maria Vang 1, Sólva Joensen 1, Laila Enghamar 1, Elsebeth Jónsson 1

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 5 | 4 | 0 | 1 | 12 | 11 | 1 | 12 |
| 2 KÍ | 3 | 3 | 0 | 0 | 27 | 0 | 27 | 9 |
| 3 VB | 4 | 2 | 1 | 1 | 17 | 7 | 10 | 7 |
| 4 B36 | 5 | 2 | 1 | 2 | 10 | 8 | 2 | 7 |
| 5 NSÍ | 3 | 0 | 0 | 3 | 6 | 10 | -4 | 0 |
| 6 Skála | 4 | 0 | 0 | 4 | 0 | 36 | -36 | 0 |

Móttøka í Havnar Klubba

Í sambandi við, at
Anne Petersen hevur sín
síðsta arbeiðsdag eftir
44 árum, bjóðar
Føroya Bjór til móttøku fyri
viðskiftafólki og øðrum í
Havnar Klubba

fríggjadagin 1. september
frá 16.00 til 20.00.

Föroya Bjór
700 Klaksvík
Tel 45 54 54, Fax 45 60 52

